Pólland er á skránni í mai

Neyðugt verður at flyta 8. umfari í landskappingini, tí landsliðið skal av landinum í vikuskiftinum

LANDSLIÐIÐ
Jóannes Hansen

Nú hevur tað loksins eydnast Fótbóltssambandinum at fáa avtalu um vinardystin, sum landsliðsvenjarin fegin hevur viljað havt í summar. Føroyar skulu spæla á útivølli í Póllandi sunnudagin 14. mai. Dysturin verður spældur í Wronki í Póllandi.

Hetta er sama vikuskiftið, sum 8. umfarið í FORMULA DEILDINI eigur at verða spælt. Enn er ikki greitt, nær hetta umfarið verður avgreitt.

Føroyar hava verið í sambandi við íslendska fótbóltssambandið, KSÍ, um vinardyst um mánaðarskiftið mai-juni. Føroyingar hava fleiri ferðir spurt seg fyri, og íslendingar hava sagt seg ætlað at svara, men svarfreistin er langt síðani farin, og enn hevur einki verið at hoyrt úr Íslandi.

– Vit harmast um, at tað ikki skal bera til at fáa svar úr Íslandi. Eg eri sera fegin um, at vit sleppa at royna okkum móti Póllandi. Teir fyrireika seg til HM endaspælið, og tí verður støðið hjá teimum ikki so langt frá tí hjá Italia og Fraklandi, sum vit skulu spæla ímóti. Eisini rokni eg við, at spælistílurin hjá teimum ikki er so ólíkur tí hjá Ukreina og Georgia, sum vit eru í EM undankappingarbólki saman við, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari.

Sunnudagin var Jógvan Martin í Gundadali.

– Talan var um fína uppgerð. Bæði HB og EB/Streymur eiga góð og spennandi fótbóltslið, sum ivaleyst fara at gera um seg í toppinum, heldur landsliðsvenjarin, sum fegnast um, at nógvir av teimum, sum eru í landsliðshópinum, tykjast at vera komnir væl frá fyrstu umførunum í landskappingini.

Hiddink til Ruslands

Kendi og dugnaligi fótbóltsvenjarin Guus Hiddink úr Hollandi hevur nú fingið nýtt starv. Hann skal venja russiska landsliðið eftir HM-endaspælið í summar. Hiddink hevur júst leitt FSV Eindhoven til hollendska meistaraheitið, og hann hevur eisini fingið Australia við til HM-endaspælið í Týsklandi. Hiddink stendur á odda fyri Australia í endaspælinum í summar, men eftir tað fer hann í starvið sum russiskur landsliðsvenjari.

Nú skulu vit stríðast fyri stigum

AaB-verjuspælarin Michael Jakobsen heldur, at liðið úr Aalborg nú av álvara skal stríðast fyri at fáa nøkur stig. AaB hevur ikki megnað at vunnið í teimum seks dystunum í superliguni higartil í ár, og heilti 15 mál eru farin ígjøgnum hesar dystir.

– Vit skulu út at stríðast. Tað er kósin, sum skal fáa okkum aftur á beint. Vit hava latið 15 mál farið inn, og vit fýra í verjuni mugu taka ábyrgdina av tí, sigur hann við heimasíðuna hjá AaB.

Millum spælararnar hjá AaB eru føroysku landsliðsspælararnir Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen, og serliga Jón Rói hevur spælt nógv seinastu seks dystirnar.

Føroya Sparikassi nýggjur høvuðsstuðul hjá GÍ

Fyrrapartin í dag skrivaðu Janus Rasmussen, GÍ, og Kristina Ellingsgaard, vegna Føroya Sparikassa, undir sponsoravtalu

Avtala er í dag gjørd millum Føroya Sparikassa og Gøtu Ítróttarfelag. Hon ber í sær, at Sparikassin komandi tvey árini er høvuðsstuðul hjá GÍ

FÓTBÓLTUR
Tíðindaskriv

Frá í dag at rokna er Føroya Sparikassi høvuðsstuðul hjá Gøtu Ítróttarfelag. Tað er greitt, eftir at peningastovnurin og ítróttarfelagið fyrrapartin undirskrivaðu ein samstarvssáttmála.

Sáttmálin, sum ber í sær, at Sparikassin í tvey ár er høvuðsstuðul hjá GÍ, varð undirskrivaður á Sparikassadeildini í Gøtu. Kristine Ellingsgaard, varaleiðari fyri deildir Sparikassans í Eysturoy, og Janus Rasmussen, formaður í GÍ, undirskrivaðu sáttmálan.

– Sparikassin stuðlar einari rød av mentunarligum og ítróttarligum tiltøkum og felagsskapum, tí vit meta tað hava stóran týdning, ikki minst í lokalsamfelagnum. Vit eru spent uppá at fylgja við í, hvussu tað nú fer at gangast GÍ og ynskja teimum góða eydnu, sigur Ólavur Jensen, sølu- og marknaðarleiðari.

Vinnandi hugburð í felag

– Fólkini í og aftan fyri GÍ leggja nógv fyri til tess at taka við avbjóðingunum á og uttan fyri vøllin. Á okkara øki leggja vit sera stóran dent á at standa okkum væl í hørðu kappingi á fíggjarmarknaðinum. Tí ber til at siga, at Sparikassin og GÍ hava nakað sera týðandi í felag – nevniliga tann sera týðandi vinnarahugburðin, ið flytir bæði fyritøkur og felagsskapir fram á leið, sigur Kristine Ellingsgaard, varaleiðari fyri deildir Sparikassans í Eysturoy.

Formaðurin í GÍ fegnast um, at felagið hevur fingið eitt gott grundarlag at byggja á.

– Vit gleða okkum til samstarvið við Føroya Sparikassa og rokna við, at bæði Sparikassin og okkara trúføstu viðhaldsfólk fara at sanna, at hetta árið fer at roynast væl hjá felagnum. Í Formuladeildini arbeiða venjari og leikarar við at byggja upp eitt nýtt lið, og til hetta arbeiði krevst eitt gott fundament, sigur Janus Rasmussen, formaður í GÍ.



GITIÐ LEIKARAN

Kappingarreglur

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.

Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS